Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Avgerðir um vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

1. Í hvørjum førum hevur landsstýrismaðurin persónliga vikið frá tilmælunum hjá umsitingini um játtan til kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir játtanir til ítøkiligt skipakeyp og ískoytiskvotur?

2. Hvørjar ítøkiligar umsóknir, snýr tað seg um, og hvussu stórar kvotur og virðir hevur landsstýrismaðurin broytt í mun til tilmælini frá umsitingini?

3. Hvørjar umsóknir hava mist og hvørjar hava fingið við avgerðum landsstýrismansins?

4. Hvørjar eru tær sakligu, lógligu og skalfestu grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum, og hvussu eru broyttu avgerðirnar skjalfestar og grundgivnar sambært fyrisitingarlógini?

Viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin hevur í svari til undirritaða upplýst, at hann sum landsstýrismaður persónliga í ávísum førum hevur vikið frá fakligu tilmælunum í fyrisitingini í sambandi við játtan til vinnuligar kvotur og verkætlanir, harundir játtanir til ískoytiskvotur.

Tí verður spurt um, júst í hvørjum ítøkiligum førum tað er gjørt, hvør hevur mist og hvør hevur fingið, og hvussu viðgerðin og avgerðirnar eru grundgivnar og skjalfestar sambært fyrisitingarlógini.

Á Løgtingi, 28. september 2021

Høgni Hoydal